umhvørvisstovan

Argir, 1. juli 2011
j.nr: 11/00455
Málsviðgeri: RT

**Uppskot**

**til**

**kunngerð um gjøld fyri upplýsingar úr landsfólkayvirlitinum o.a.**

Við heimild í § 29, stk. 2, § 30, § 32, § 33, § 34, § 37, stk. 1, § 38 og § 47, stk. 2 í løgtingslóg nr. 41 frá 8. mai 2007 um fólkayvirlit, verður ásett:

**§ 1.** Fyri elektroniska atgongd og upplýsingar úr talgildu landsfólkayvirlitsskránni skulu almennir myndugleikar, og myndugleikar í danska ríkinum, rinda hesi gjøld:
1) Stovnsetingargjald 4.000 kr.
2) Hald 400 kr. um mánaðin.
3) Hópuppsløg 2 kr. fyri hvønn persón.
4) Dagføringar 2 kr. fyri hvønn persón.
*Stk. 2.* Fyri stakupplýsingar úr kommunala fólkayvirlitinum er gjaldið 25 kr. fyri hvørt uppslag.

**§ 2.** Fyri elektroniska atgongd og upplýsingar úr talgildu landsfólkayvirlitsskránni skulu onnur, sum ikki eru almennur myndugleiki, rinda hesi gjøld:
1) Stovnsetingargjald 8.000 kr.
2) Hald 800 kr. um mánaðin.
3) Hópuppsløg 2 kr. fyri hvønn persón.
4) Dagføringar 2 kr. fyri hvønn persón.
*Stk. 2.* Fyri stakupplýsingar úr kommunala fólkayvirlitinum er gjaldið 50 kr. fyri hvørt uppslag.

**§ 3.** Fyri upplýsingar til hagtalsgerð ella vísindalig endamál verður goldið eftir rokning.
*Stk. 2.* Fyri upplýsingar úr gomlum fólkayvirlitistilfari verður goldið eftir rokning.
*Stk. 3.* Gjaldið eftir rokning verður ásett við støði í einari uppgerð yvir tímatalið, ið nýtt er til viðgerð og avgreiðslu. Tímagjaldið er 500 kr.

**§ 4.** Fyri skjalaváttan frá kommununi um egið persónstal er gjaldið 50 krónur.

**§ 5.** Gjaldið fyri fyrispurningar frá útlendskum almennum myndugleikum og privatpersónum er 100 kr. fyri hvønn persón, spurt verður um.

**§ 6.** Ásetingarnar um gjøld eru ikki galdandi fyri tey, sum lata upplýsingar til og føra landsfólkayvirlitið.

**§ 7.** Umhvørvisstovan fyriskipar uppkrevjingina av gjøldum viðvíkjandi upplýsingum úr landsfólkayvirlitnum.
*Stk. 2.* Hvør kommuna sær fyriskipar uppkrevjing av gjøldum viðvíkjandi upplýsingum úr kommunala fólkayvirlitinum.
*Stk. 3.* Verða uppkravd gjøld ikki goldin rættstundis, verður renta roknað

Postbox 2048 · 165 Argir · Tlf 342400 · fax 342401 · us@us.fo · www.us.fo

samsvarandi ta til hvørja tíð galdandi rentu sambært § 5 í rentulógini.
*Stk. 4.* Misrøkir ein haldari gjaldskyldu sína, skal Umhvørvisstovan senda viðkomandi áminning um hetta við nýggjari gjaldsfreist. Verður seinna gjaldfreistin ikki hildin, kann Umhvørvisstovan, uttan aðra ávaring, slíta haldið.

*Gildiskoma*

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi 15. august 2011.

**John Johannesen**
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen